# Bókaverk um torvsøgu føroyinga



Petur Jacob Sigvardsen greiddi frá arbeiðnum at skriva bókina á móttøku í Miðlahúsinum í gjár

**Petur Jacob Sigvardsen hevur fest siðsøguna innan torvmentanina á blað við umfatandi bókaverki, sum hann hevur arbeitt við í meira enn 24 ár**

BÓKAÚTGÁVA
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Petur Jacob Sigvardsen hevur givið út eitt bókaverk sum kallast ”Torvið í Føroyum”. Talan er um eitt bókaverk í fimm bindum. Petur Jacob hevur arbeitt við hesum evninum síðani ´81 og ´82, tá ið hann skrivaði eina ritgerð til ein eina ritgerðakapping, sum Fróðskaparsetur Føroya skipaði fyri.

Í fororðunum ásannar Petur Jacob, at torvmentanin hoyrir fortíðini til. Tað nýggja ættarliðið kennir als ikki til torv, og tey, sum hava uppliva at fara eftir torvið, fækkast í tali. Fyri at varðveitta søguna og siðsøguna í hesum mentanararvinum, hevur hann tí skrivað hetta verk.

Tilfarið í bókini er bygt á samrøður við heimildarfólk. Við hesum roynir hann at lýsa torvarbeiðið í øllum bygdunum kring landið.

Í gjár var móttøka í Miðlahúsinum, har ið Petur Jacob greiddi frá arbeiðnum at gera bókina.

- Tað var ein hugnalig løta, sigur Petur Jacob Sigvardsen, sum fegnast um tey uppmøttu.



*Fólk lurtaðu við áhuga, tá ið Petur Jacob greiddi frá*

# Kærleikin í hásætið




*Fimm eldhugaðir ungdómar. Fremst frá vinstru: Sjúrður Zachariassen, Nanna Jürgens og Tróndur Høgnason. Aftast frá vinstru: Birgith Lassen og Barbara Laetitia Méresse*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í annaðkvøld verður eitt tiltak í Rex, har ið tónleikur og fyrilestrar verða á skránni. Fyriskipari er ungdómsbólkurin Eldhugaður Ungdómur, sum arbeiðir fyri at fáa kynsligan samleika skoytan uppí grein 266b**

REVSILÓGIN
*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Ungdómsbólkurin ”Eldhugaður ungdómur” skipar fyri tiltaki í morgin í Rex. Talan er um eitt pro-samkynd tiltak. Bólkurin, sum skipar fyri, er mannaður við ungum eldhugaðum fólkum, sum vilja markera seg.

- Ungdómurin hevur ikki markerað seg nóg væl, men tað ynskja vit at gera við hesum tiltakinum. Vit hava prentað nakrar t-skjúrtur, sum lýsa okkara boðskap. Vit ynskja at vera positiv og at framhevja kærleikan. Kjakið hevur mangan verið sera negativt, og tey samkyndu hava verið samanborin við mangt og hvat ótespiligt, siga tey.

Í Rex í morgin verða ymiskir persónar, sum koma at hava orðið. Talan er um væl lærd fólk, sum øll eru fyri at skoyta kynsligan samleika upp í grein 266b. Eisini verður nógvur tónleikur á skránni.

- Øll fólkini, sum luttaka í annaðkvøld, eru pro-samkynd, siga tey ungu.

Aftaná fyrilestrarnar verður ein stuðulskonsert. Eitt møguligt yvirskot fer til Friðarbogan.

Hetta verður ikki síðsta tiltak, sum Eldhugaður Ungdómur skipar fyri.

- Vit ætla okkum at skipa fyri onkrum øðrum tiltøkum, áðrenn uppskotið um lógarbroytingina fer til 2. viðgerð. Vit fara at gera átøk heilt til 3. viðgerð, tá ið broytingin vónandi verður samtykt, siga tey.

Tey hava ymisk hugskot men vilja ikki siga meira, áðrenn tað er vorðið meira ítøkiligt. Tey leggja dent á, at tey vilja leggja dent á tað positiva og kærleikan í einum kjaki, sum mangan hevur verið sera negativt.